# Nýggj fløga frá Malin

FLØGUÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Seinast í hesum mánaðinum gevur Malin Zachariassen út nýggja fløgu við heitinum »Eg vil fylgja«. Fyri fýra árum síðani gav hon út fyrstu fløgu sína »Drekk av vatninum«.

– Tað nýggjast á fløguni havi eg gjørt á páskum í ár, og tann elsti sangurin varð gjørdur í 1998, sum ikki kom við á hina fløguna, greiðir Malin frá.

Alt tilfarið var so at siga klárt fyri hálvum øðrum ári síðani, men so fingu Malin og Jan ein son, so hon bíðaði við at fara í holt við framleiðsluna av fløguni.

Í juli byrjaðu upptøkurnar so smátt, og tveir mánaðir seinni var fløgan liðugt upptikin. Bert tað eina lagið vantaði, og tað varð upptikið nú fyri stuttum.

Á fløguni eru 12 løg, har Malin hevur gjørt orð og løg til øll sjálv.

Fløgan er liðugt mixað og týsdagin og mikudagin í næstu viku skal hon mastrast.

Ein partur av fløguni er upptikin í Útvarpi Føroya, men meginparturin er upptikin heima hjá Malini og Jan. Tann fyrsti sangurin á fløguni er upptikin heima í køkinum.

Fyrra fløgan »Drekk av vatninum« er útseld í sølubúðunum, men hon verður endurprentað. Tann fløgan varð eisini útgivin á svenskum. Um tað sama verður gjørt við seinnu fløguni er ikki heilt avgjørt enn, tí tað er als ikki vist, at tað letur seg gera at umseta sangirnar.

– Boðskapurin í fløguni er andaligur. Fløgan er ógvuliga fjølbroytt. Har er sálmakendum løgum til popp og stillar balladur, sigur Malin, og greiðir frá, at heitið á fløguni peikar á, at vit hava øll ábyrgd fyri okkara egna lívi.

– Tað nyttar onki, hvat hini gera, og vit eiga at velja, hvønn veg vit vilja ganga, meðan vit enn hava tíð til tess.


*FLØGUÚTGÁVA: Malin Zachariassen gevur síðst í november út fløguna »Eg vil fylgja«*
*Mynd: Jens Kr. Vang*





Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing – Bachelor í sjúkrarøktarfrøði – byrjar 2. februar 2004.

Vilt tú hava eina útbúgving har tú:
- fært stórar avbjóðingar, nógvar valmøguleikar og brúk fyri tínum persónligu eginleikum og hollari ástøðiligari vitan.
- hevur nógvar starvsmøguleikar innan alla heilsutænastu og møguleikar fyri at arbeiða uttanlands, bæði hjá humaniterum stovnum og øðrum ótraditionellum støðum.

Treytirnar fyri upptøku eru:
- at umsøkjarin hevur lokið students, HF, HH, HT, HIF-prógv ella líknandi prógv.
- umsøkjari, ið hevur aðrar royndir og/ella útbúgvingar, men ikki fult út lýkur krøvini kann fáa atgongd, um so er at hann hevur í minsta lagi 9 mánaða arbeiðsroyndir ella aðrar viðkomandi royndir og prógv á miðnámsskúlastøði í fakunum: Føroyskt, Danskt B ella annað norðurlendskt mál á sama støði, Enskt B Evnafrøði B ella Lívfrøði B, Samfelagsfrøði C ella Sálarfrøði C.

Umsóknarbløð og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, Eirargarður 14 B, tel. 31 59 50.

Umsóknarfreist fríggjadagin 21. november 2003.

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, Eirargarður 14B, FO-100 Tórshavn
tel: 31 59 50, faks: 31 39 26, teldupostur: srfs@skulin.fo, www.srfs.fo

Oddi
hevur føðingardag






Øll børn, ið koma at tøma bússuna, fáa eina gávu. Harumframt fáa tey eisini eitt flagg við Odda á.

Frá kl. 14.00 til kl. 16.00 er Oddi at hitta á hesum støðum:

Í Tórshavn: mánadagin 3. november
Í Porkeri: mikudagin 5. november
Í Vági: hósdagin 6. november

SUÐUROYAR SPARIKASSI




# Skulu gjalda fyri onga tænastu

*HOYRILÍKINDI: – Tað er bert ein spurningur um tíð, hvussu leingi afturat eg gjaldi útvarpsgjald, sigur ein ónøgdur útvarpslurtari á Oyrarbakka, Sigurd Johannesen*



**Íbúgvararnir í Sundalagnum hoyra Útvarp Føroya so illa, at Sigurd Johannesen, sum áður hevur noktað at gjalda útvarpsgjald, umhugsar at nokta enn einaferð. – Tað er bert ein spurningur um tíð, hvussu leingi eg rindi útvarpsgjald, sigur hann**

HOYRILÍKINDI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

– Tað er heilt ófatiligt, at Rás 2 kann hoyrast so væl, og vit als ikki hoyra Útvarp Føroya, sigur Sigurd Johannesen av Oyrarbakka.

Hoyrilíkindini hjá Útvarp Føroya eru so vánalig í Sundalagnum, at Sigurd Johannesen heldur velur at lurta eftir Rás 2.

– Tú hoyrir útvarpið, men um ein bilur verður parkeraður beint við húsini, so noyðist tú út at flyta bilin. At lurta í stereo ber als ikki til. So suðar tað bara í tólinum, greiðir Sigurd Johannesen frá.

## Klagað fyrr

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at Sigurd Johannesen klagar um vánaligu hoyrilíkindini. Fyri nøkrum árum síðani gjørdi hann vart við seg, og noktaði at gjalda útvarpsgjald. Fleiri brøv vórðu send til útvarpið, og hann var eisini í fjølmiðlunum við hesum málinum.

– Eg endaði í rættinum, og varð dømdur til at gjalda útvarpsgjald. Teir pantsettu húsini, og løgreglan hevur eisini verið eftir mær fleiri ferðir. Nú gjaldi eg fult gjald, men eg havi goldið hálvt gjald í eina tíð, greiðir ónøgdi lurtarin frá.

Men tað er ikki við góðum vilja, at Sigurd nú rindar útvarpsgjald.

– Eg varð noyddur til tað. Myndugleikarnir standa ov sterkir í hasum málinum. Sambært tí, sum Útvarp Føroya sigur, so er tað Telefonverkið, sum stendur fyri sendarunum, og eg haldi, at útvarpsstjórin átti langt síðani at tikið í nakkan á teimum, heldur Sigurd Johannesen.

## Byrjar aftur

Tá Sigurd varð dømdur at gjalda útvarpsgjald, gav hann skarvin yvir orsakað av persónligum ávum. Og enn hevur hann ikki havt orkuna til at taka arbeiðið uppaftur. Men tað ætlar hann sær. Spurningurin er bara nær.

– Eg varð noyddur at gjalda útvarpsgjald, so tað ikki gjørdist til eina alt ov stóra upphædd, sum eg skuldi rinda. Men tað er bara ein spurningur um tíð, hvussu leingi eg haldi áfram við at gjalda, sigur Sigurd, sum leggur afturat, at sjónvarpið er blakað út, tí Sjónvarp Føroya sæst eisini alt ov illa.

**Vit hava roynt at fingið eina viðmerking til málið frá útvarpsstjóranum, Jógvan Jespersen og frá tekniska leiðaranum á Føroya Tele, Páll Vesturbúð, men hvørgin teirra var at hitta áðrenn blaðið fór til prentingar.**


TELEFONBÓKIN 2004

Seinasta freist at lata broytingar inn er fríggjadagin 7. november 2003

**Í mars 2004 verður telefonbókin fyri ár 2004 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

**Hvítu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2004 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 650 í telefonbókini 2003,ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**

| | |
|---|---|
| (A)+(D) Standardlýsing | kr. 650,00 |
| (B) Stórt navn | kr. 50,00 |
| (C) Innramming | kr. 100,00 |
| (E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) | kr. 25,00 |

(sí dømi á s. 648 í Telefonbókini 2003)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 649 í telefonbókini 2003, ið skal sendast til:
Teleforlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**
**www.gulu.fo · info@gulu.fo**